## Balling setti gongd á

Næstved vann góðan sigur í donsku 1. Deild um vikuskiftið. Næstved hevði vitjan av Thisted, og teir av Sælandi vunnu heili 4-1. Fyrrverandi NSÍ framherjin Ulrik Balling legði fyri og skoraði fyrsta málið hjá Næstved eftir eitt korter. Næstved kom á odda 4-0, áðrenn Thisted minkaði um munin seint í dystinum.



## Dida fær kjansin aftur

Brasilski málmaðurin Dida gjørdi ein ordans brølara, tá ið AC Milan í farnu viku spældi Champions League dyst ímóti Real Madrid. Tað eydnaðist tó AC Milan at vinna, og venjarin hjá Milan hevur ikki uppgivið Dida sum málmann. - Mistakið var skelkandi, men hann megnaði at spæla seg uppaftur, og tað eru ikki nógvir málmenn, sum høvdu klárað at fóta sær so væl eftir slíkt mistak, sigur Leonardo við Football Italia.

### StÍF – Neistin 26-36 (13-17):

# Hinir tóku ábyrgd



**Landsliðsleikararnir Áki Mørk, Heini Hanusarson og Ingi Olsen vóru ikki á vøllinum. Men David Edvardsen og Jugoslav Djumic syrgdu fyri, at breiddin á hópinum ikki kann nýtast sum umbering, um Neistin ikki vinnur gull-heiðursmerki í 2010**




Uni Holm Johannesen

Áki Mørk. Heini Hanusarson. Ingi Olsen. Finnur Hansson. Birgir Poulsen. David Edvardsen. Jugoslav Djumic.

Í fjør tóktist tað sum ein stórur meinbogi. At hópurin hevði ov nógvar framúrskarandi einstaklingar. Tí eingin vildi ganga undan í mótgangi, men heldur goyma seg í rúgvuni. Líkamikið, hvussu venjarin setti liðið saman. Men tað er nú broytt.

Áki Mørk var burturstaddur, Heini Hanusarson hevði leikbann og Ingi Olsen var ikki á vøllinum, tá Neistin vann greitt á útivølli móti StÍF í gjár. Men tað var eingin trupulleiki yvirhøvur. Tí David Edvardsen og Jugoslav Djumic syrgdu við tólv málum hvør, at Neistin er nýtt oddalið í bestu mansdeildini.

### Alt riggaði

Ikki tí. Dysturin í gjár var sjáldsama frálíkur hjá Neistanum. Teir hava havt ymsar trupulleikar í hesum kappingarárinum, men í gjár riggaði alt. Jugoslav Djumic styrkti sína støðu sum besti strikuspælari í landinum, meðan David Edvardsen tykist vera væl fyri eftir eitt heldur anonymt kappingarár í fjør.

Tað var eisini gleðiligt hjá venjaranum Inga Olsen, at yngra ættarliðið stóð seg væl. 19 ára gomlu Sjúrður Thomassen og Heini Ragnarsson smæddust ikki burtur, tá teir vórðu innskiftir. Ein staðfesting av, at Neistin aftur í ár eigur besta hópin í landinum. Men tað vinnur einki meistaraheitið einsamalt.

Verjuspælið var ofta ein vansi hjá Neistanum í fjør. Tað hevur tað eisini verið onkutíð í ár – millum annað, tá VÍF skoraði 35 ferðir í høllini á Hálsi í farnu viku. Men um vikuskiftið riggaði hesin parturin at spælinum nógv betur.

Cristian Preda var størsta hóttanin hjá StÍF. Hann var toppskjútti hjá heimaliðnum við átta málum.

### Komu ongantíð aftur

StÍF hevur kappast við Neistan í oddinum fyrstu umførini, men á Skála í gjár var lítil kapping. Neistin leyp undan mótstøðuni alt fyri eitt, og hóast heimaliðið royndi at stríða seg aftur, eydnaðist tað ongantíð. Fýra mál vóru á muni í steðginum, og 10 mál vóru á muni, tá avtornaði.

### FAKTA

**StÍF-Neistin 26-36 (13-17)**
**10 min:** 3-6
**20 min:** 9-14
**40 min:** 16-23
**50 min:** 17-29
**Málskjúttar**
**StÍF:** Cristian Preda 8(2), Mortan Hansen 5(2), Gabriel Stanciu 4(1), Jóannes Prestá 3, Bárður Danielsen 2, Jógvan Berg 2, Jógvan G. Joensen 2
**Neistin:** David Edvardsen 12(3), Jugoslav Djumic 12, Finnur Hansson 6, Heini Ragnarsson 3, Sjúrður Thomassen 1, Jens Mohr 1, Birgir Poulsen 1
**Brotskøst:** StÍF 7, Neistin 4
**Útvísingar:** StÍF 5, Neistin 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen.

### Kyndil-KÍF 24-22 (9-10):

# KÍF gav mótstøðu

**Kyndil var í stórum trupulleikum, men megnaði í evstu løtu at toga væntaða favoritt-sigurin heim, tá KÍF vitjaði sunnudagin**




Jákup Mørk

Fyrstu umførini hevur KÍF so ruddiliga verið við undirlutan í øllum dystunum, sum teir hava spælt, og tí var helst væntandi, at Kyndil hevði eina yvirkomuliga uppgávu sunnudagin.

Kyndil er í breiða feltinum frammi í oddinum, og tí var sigurin móti KÍF eitt treytaleyst krav. Men hetta skuldi tó vísa seg at vera sera trupult at uppfylla.

Kollfirðingar bitu nevnliga hart frá sær gjøgnum allan dystin. Undan steðginum vóru teir eitt skifti á odda við trimum málum, men seinastu minuttirnar fekk Kyndil togað seg nakað nógv nærri.

Eftir steðgin tóktust vertirnir at fáa betri tak á dystin. Hóast munurin ikki gjørdist stórur, so hevði Kyndil hug at hála seg nakað avstað, men heldur ikki hesa ferð eydnaðist at halda fast.

Tvørtur ímóti kom KÍF aftur framum, og seinastu spentu minuttirnar stóð fleiri ferðir á jøvnum. Í evstu løtu eydnaðist tó hjá Kyndli at toga seg avstað. Teir skoraðu tvey mál seinastu minuttirnar, uttan at gestirnir fingu nakað, og so vórðu stigini hóast alt verðandi í Havnini. Men dysturin tænti avgjørt sum áminning um, at eingin dystur er vunnin, fyrr enn dómarin hevur bríksláð seinastu ferð.

### FAKTA

**Kyndil-KÍF 24-22 (9-10)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 5-8
**40 min:** 12-14
**50 min:** 17-17
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Rani Ellingsgaard 5, Høgni Klein 4, Kristoffur Kristoffersen 4, Janus Einar Sørensen 3, Hans Áki Dal-Christiansen 3(1), Josef Abrahamsen 2(1), Ken Zachariasen 2(1), Bárður Johannesen 1
**KÍF:** Niklas Reginsson 5, Andreas Nielsen 3, Regin Petersen 3, Arnbjørn Hansen 3, Ási Dam 3(2), Teitur Joensen 1, Ingi Johannesen 1, Tony Weihe 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, KÍF 3
**Útvísingar:** Kyndil 6, KÍF 8
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen